

VITJAN

*Drotningahjúnini vóru væl nøgd við fyrireikingarnar av vitjanini. - Vit koma skjótt aftur, søgdu tey bæði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

um at brúka ávísar dagar.

Vitjanin í Kunoy var ikki liðug fyri tað, tí eitt annað vakurt stað í bygdini var eftir at vitja, nevniliga viðarlundin, har drotningin plantaði eitt træ.

Ætlanin var vist, at drotningahjúnini bæði skuldu vera við til hesa løtuna, men Heindrikkur kom ikki allan vegin niðan ta rímiliga brøttu brekkuna til viðarlundina.

- Tað er okkurt við beinunum, segði Heindrikkur stutt á tíðindafundinum í gjár.

## Málaði

Fyrrapartin mikudagin varð eisini vitjað í Klaksvík - á Føroya Bjór, Húsarhaldsskúlanum, skúlaskipinum Draganum og Fornminnissavninum, har morgunmatur var etin.

Á leiðini aftur til Havnar varð steðgað á lægsta staðnum í Kongaríkinum, nevniliga í Norðoyatunlinum. Her steðgaðu drotningahjúnini eina góða løtu fyri at skoða "listaverkið" hjá Tróndi Patursson í Norðoyatunlinum.

Í miðal koyra um 1900 bilar gjøgnum tunnilin um dagin, men hesa løtuna var øll ferðsla steðgað báðumegin, soleiðis at drotningahjúnini ótarnað kundu heilsa uppá stjóran í Norðoyatunlinum, Una Danielsen og nevnd og starvsfólk felagsins.

Ikki óvæntað tóktust tey sera hugtikin av sjáldsomu litunum her undir havsins botni, og gingu ein minni túr runt í tunlinum, áðrenn ferðin gekk víðari.

Tann stóri og ósvaraði spurningurin tá var, hvar drotningahjúnini fóru. Eingin visti, hvørki tey sum høvdu skipað fyri vitjanini, men onkur helt seg vita, hvat hon hevði gjørt - men ikki hvat.

- Ja, eg fekk møguleika at mála eitt sindur henda seinnapartin, váttaði Margretha á tíðindafundinum í gjár.

snorri@sosialurin.fo